Fleiri rásir - einki roks

Á DR1 leygarkvøldið kl. 19.50

# Olsen-banden på spanden



Tað gongur hart fyri seg, tá Olsen-bandin leggur seg út við amerikonsku mafiuna

**Ein forelskaður Egon Olsen skal royna at koma seg í samfelagsskipanini, men sum ikki einaferð, so hava brotsgerðirnar størri áhuga**



*Talan er um næsta filmin í røðini um teir tríggjar, Egon, Benny og Kjeld. Ein filmsrøð, sum við tíðini gjørdist ein partur av donsku fólkasálini*

Her er talan um næsta filmin í væl kendu røðini um teir tríggjar, Egon, Benny og Kjeld. På Spanden kom á hvíta løriftið í 1969, og tað var fyrst og fremst við hesum filminum, at fólk av álvara fingu eyguni upp fyri fólkakæra bandanum, sum framvegis í dag eigur eitt stórt pláss í donsku fólkasálini.

Egon hevur enn einaferð verið í fongsli, men hesaferð hevur almannaverkið sett sær fyri at fáa skil upp á smákriminella heila hansara. Hann skal verða partur av eini resosialiseringsskipan, og tað verður tann vakra Bodil – Ghita Nørby – sum skal ansa eftir, at hetta gongur eftir ætlan. Og við vakra málsviðgerðanum tykist tað eisini, sum hevur Egon fingið ein eyka motivatiónsfaktor í stríðnum at gerast ein hampamaður.

Tað eydnast tó ikki Bodil heilt at taka pippið frá Egon. Tað vildi nú heldur ikki líkst honum serliga nógv, um hann lá á løtu síðuni ein heilan biograffilm. Amerikanskir brotsmenn koma upp í leikin, og so er Olsen Bandin at kenna aftur.

Sum vit øll eru von við, so er tað Ove Sprogøe, sum hevur leiklutin sum Egon. Morten Grunwald og Poul Bundgaard hava leiklutirnir sum Benny og Kjeld, og húsliga partinum stendur Kirsten Walther – alias Yvonne – fyri.

Hartil finna vit eisini aðrar av føstu leiklutunum í hesum næsta filminum við Olsen-bandanum. Preben Kaas varð virðisløntur fyri sín leiklut sum Dynamit-Harry, og teir báðir løgreglumenninir verða spældir av Peter Steen og Poul Reichardt.

Sum vant er tað Erik Balling, sum hevur skrivað handritið og leikstjórnað.

# Ukraina-Danmark

Á TV3 mikudagin kl. 16.00



*Talan verður um seinsta landsdystin við Svend Gehrs sum frásøgumanni*




*Stór ábyrgd liggur á Jon Dahl Tomasson, sum er maðurin, ið danir vóna fer at skjóta landið til HM-endaspælið*

Skal Danmark við til HM-endaspælið í Týsklandi komandi summar, eru stig neyðug, tá teir mikudagin vitja í Ukraina.

Danir hava bert vunnið eina ferð fyrstu fimm dystirnar í endaspælinum, og tí er trýstið á Morten Olsen og hansara menn stórt, nú vandi er fyri, at liðið ikki verður partur av endaspælinum. Um so er, so verður tað fyrstu ferð síðani 1994.

Morten Olsen sjálvur var »leikbannaður«, tá danir spældu seinast, men hann er aftur á beinkinum. Tað er venjarin hjá Ukraina – fyrrverandi stórspælarin – Oleg Blokhin tó ikki. Hóast góðu úrslitini, so hevur stórt trýst verið á venjaranum, og nú hevur hann so stungið í sekkin.

Millum mongu dystirnar, sum verða í dystinum, verður ivaleyst áhugavert at fylgja við, hvussu tað gongst teimum báðum Milan-stjørnunum, Andrej Shevchenko og Jon Dahl Tomasson.

Talan er annars um seinasta dystin, har Svend Gehrs fer at siga frá. Hann hevur síðani 80’ini verið ein av ímyndunum av donsku dynamitt-dreingjunum, og vónin er sjálvandi, at hann enn einaferð kann siga »Ih hvor det luner« tá danir fáa týðandi stig í undankapping.